## Ísland má helst bíða

Nógv bendir nú á, at íslendska umsóknin um limaskap í Evropasamveldinum fær ikki so skjóta viðgerð, sum tær fyrstu ábendingarnar vístu. Tá umsóknin varð send til Bruxelles, ljóðaði, at ES-nevndin fór at viðgera hana so mikið skjótt, at nevndin kundi leggja sítt tilmæli fyri ríkis- og stjórnarleiðarafundin í desember. Men sambært íslendska uttanríkisráðnum hevur viðgerði drigið út, tí fólk eru farin úr nevndini, og onnur komin ístaðin fyri. Tí væntar Össur Skarphéðinsson, uttanríkisráðharri, at umsóknin má bíða til toppfundin í mars næsta ár. Tað sigur hann við Morgunblaðið í dag.



## Statoil á oljuleiting

Statoil ætlar sær at fara undir oljuleiting í Grønlandi sum skjótast. Norska blaðið Dagens Næringsliv skrivar, at Statoil ætlar sær at bjóða seg fram, tá næsta útbjóðingarumfar verður í Grønlandi í 2013. Ein talsmaður fyri Statoil sigur við blaðið, at felagið er sannført um, at nógv olja og gass eru í grønlendsku undirgrundini, og harafturat benda tey jarðfrøðiligu viðurskiftini á, at Grønland er eitt áhugavert øki, sigur hann. Í 2000 gjørdi Statoil eina roynd at finna olju í Vesturgrønlandi, men fann einki.

# Fer at skunda sær at finna pengar til Smyril

**Johan Dahl sigur, at tað hevur bráðskund at finna pengar, so at Smyril sleppur í dokk sum skjótast**



*Johan Dahl sigur, at hann fer at skunda sær at finna neyðugu játtanina, so at Smyril sleppur í dokk sum skjótast at fáa eina endaliga loysn á teknisku trupulleikunum. Her er hann avmyndaður á fundi sum kallað var til í skundi á Strandferðsluni á Tvøroyri mikumorgunin um teknisku trupulleikar á Smyrli. Aftanfyri hann situr Kjartan Kristiansen, ráðgevari í vinnumálaráðnum*

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er eitt mál, sum hevur bráðskund og tí fari eg at arbeiða skjótt.

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at hann fer at arbeiða skjótt fyri at finna pening so at Smyril kann sleppa í dokk sum skjótast og allarhelst longu í vár.

Hann hevur sagt at trygdin á Smyrli verður tikin fram um alt og tí verður neyðugt at finna neyðugu játtanina.

Leyðsligа mett fer tað at kosta einar 11-13 milliónir at seta tær neyðugu skipanirnar í Smyrli sum loysa trupulleikan einferð fyri alla tíð.

Nú skal Strandferðslan so roknað kostnaðin út nágreiniliga og so skjótt tað er gjørt, fer hann at biðja Løgtingið um at játta neyðugu upphæddina til endamálið.

Tað fer hann antin at gera í sambandi við sjálva fíggjarlógina, sum skal samtykkjast fyri ársskiftið, ella við eini umbøn um eykajáttan.

Annars hevur samgongan avgjørt, at tað verða bara tvær umsóknir um eykajáttan lagdar fyri tingið um árið, ein um várið og ein um heystið.

Men Johan Dahl staðfestir, at tað kann ikki bíða til í vár at fáa játtanina til Smyril.

Eydnast tað ikki at fáa tað við í vanligu fíggjarlógina, fer hann tískil at biðja um eykajáttan beinanvegin.

### Skilja støðuna

Landsstýrismaðurin sigur, at hann hevur tosað við bæði løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum og teir taka undir við, at peningurin skal játtast.

Johan Dahl sigur, at hann fer eisini at kunna landsstýrið um málið á fundi, men hann væntar avgjørt ikki, at tað verður nakar trupulleiki at finna pengarnar.

Spurningurin er so, hvaðani peningurin skal koma.

Johan Dahl staðfestir, at tað kann ikki koma upp á tal at finna pengarnar aðrastaðni á hansara málsøki í vinnumálaráðnum.

- Hetta eru brek við sjálvum skipinum og tí verður tað rætt og slætt neyðugt at játta pengarnar til neyðugu ábøturnar, sigur Johan Dahl.

Les eisini grein á síðu seks, at Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni, staðfestir, at tey har fáa tey onki gjørt, fyrrenn pengarnir eru játtaðir.

# Kirkjuráðini í Havn og Hoyvík skipað seg

**Sunnudagin, 1. sunnudag í advent, taka tey nýggju kirkjuráðini kring landið við. Í Dómkirkjuni og í Hoyvíkar kirkju komu bert ein listi inn, og hava tey nú skipað seg**

KIRKJURÁÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú fyrsta sunnudag í advent taka nýggj kirkjuráð við kring landið. Nógv nýggj andlit eru helst at síggja í ymsu kirkjuráðunum, og serliga í Havn og í Hoyvík er kanska ringt at vita, júst hvør situr í kirkjuráðnum.

Í Dómkirkjuni, Havnar Kirkju, kom bara ein listi, so har var einki val. Nýggja kirkjuráðið hevði fund tann 17. november, og har skipaðu tey seg soleiðis.

Ása M. Justinussen, forkvinna
Inga Dahl, næstforkvinna
Kartni Olsen, kirkjuverji
Hans Debes, kassameistari
Sólrún Michelsen, skrivari
Helgi í Brekkunum
Vagnur Michelsen
Andrias Sjóvara
Kaj P. Mortensen
Jacoba Funding
Ester Simonsen

### Hoyvíkar Kirkja

Hoyvíkar kirkja er nú vorðin sjálvstøðug kirkjusókn. Har kom eisini bara ein listi inn, og var tískil einki val har heldur. Nýggja kirkjuráðið í Hoyvíkar Kirkju hevur skipað seg soleiðis.

Jákup Símun Simonsen, formaður
Uni Danielsen, næstformaður
Petur Even Djurhuus, skrivari
Bente Kjær, kirkjuverji
Heðin Mikkelsen, kassameistari (valdur av kirkjuráðnum uttanífrá)
Katrin Dahl
Anna Dahl-Olsen
Malan Rasmussen
Snorri Brend



*Hoyvíkar Kirkja er nú sjálvstøðug kirkjusókn, og har tekur eitt nýtt kirkjuráð við sunnudagin*
*Savnsmynd*